## Bjartskygni í USA

Aftan á ein fund í gjár kunngjørdi amerikanski tjóðbankin fyri fyrstu ferð, at afturgongdin í búskapinum er steðgað, og at útlitini fyri búskapinum eru betur nú, enn tey hava verið í seinastuni. Tað skrivar Bloomberg News. Christopher Rupkey, sum er búskaparfrøðingur hjá Tokyo Mitshubishi-bankanum, sigur við tíðindatænastuna, at sambært boðskapinum hjá bankanum er heimsbúskapurin komin so mikið fyri seg aftur, at hann kann skapa vøkstur uttan almennan stuðul. Um rentuna sigur amerikanski tjóðbankin, at hon verður verandi søguliga lág eina rúma tíð afturat.



## Lovaði arbeiðspláss

Amerikanski forsetin, Barack Obama, segði í einari røðu fyri amerikanska fólkinum í nátt, at tann størsta uppgávan hjá stjórnini í 2010 verður at útvega fólki arbeiðspláss. Hann segði, at hjálparpakkin, sum stjórnin veitti í fjør, fer at geva hálva aðru millión arbeiðspláss í ár. Hann boðaði frá, at stjórnin fer at brúka 30 milliardir dollarar til at læna smáum vinnuvirkjum, og at stjórnin hevur sett sær sum mál at tvífalda amerikanska útflutningin tey næstu fimm árini. Obama segði, at hann fer at seta eina serliga nevnd at leita eftir fleiri sparingum innan tað almenna.

Tórshavnar kommuna:

# Vil ikki kenna sannleikan um dagstovnar

**Hóast Tórshavnar kommuna gjørt umfatandi kanning av dagstovnunum, kann hon ikki upplýsa úrslitið hjá minni umtóktu stovnunum. – Teir upplýsingarnar hevur kommunan ikki biðið um, og tí hevur hon teir ikki, sigur umsitingin**



*Hóast Tórshavnar kommuna hevur rindað umleið 200.000 krónur fyri nøgdsemiskanning av dagstovnunum í kommununi, so finnast skjølini – sum upplýsa, hvørji ummæli ávísu stovnarnir hava fingið – ikki innan tjúkku veggirnar í býráðnum. Orsøkin er, at kommunan als ikki hevur áhuga í upplýsingunum*

KANNING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tórshavnar kommuna hevur ikki upplýsingar, sum kunnu seta navn á, hvussu ymisku dagstovnarnar í kommununi hava klárað seg.

Hetta eru upplýsingarnir, sum umsitingin í Tórshavnar kommunu kemur við, eftir at Sosialurin hevur biðið um innlit í, hvørji skoðsmál ymisku dagstovnarnir undir Tórshavnar kommunu hava fingið frá foreldrunum í nøgdsemiskanning, sum greiningarfyritøkan Lóður hevur gjørt fyri kommununa.

– Tað er Lóður, sum hevur ráu upplýsingarnar, og tað er Lóður, sum hevur greitt ymisku stovnunum frá, hvussu skoðsmálið hjá ymisku stovnunum eru. Vit hava ikki upplýsingarnar, sigur Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri í Tórshavnar kommunu, um kanningina, sum kommunan júst hevur rindað einar tveyhundraðtúsund krónur fyri, umframt, at ymisku dagstovnarnir sjálvir hava fingið at vita, hvussu teirra stovnur kláraði seg.

### Fingið allar upplýsingar

Sosialurin bað um at fáa sett nøvn á prikkarnar í einum einstakum skjali í kanningini, sum kommunan hevur latið gjørt.

Men í teimum yvir 80 økrunum, sum Tórshavnar kommuna hevur latið, sum var upp á umbønina um innlit, er bert upplýst navn saman við trimum av teimum best umtóktu stovnunum.

Hetta eru teir somu tríggir stovnarnir, sum vórðu almannakunngjørdir á tíðindafundi, sum Tórshavnar kommuna kallaði til mánadagin.

Nærri kemur Sosialurin ikki svarinum, sambært Katrini Petersen, deildaleiðara á barna- og ungdómsdeildini hjá Tórshavnar kommunu.

– Hetta eru ikki upplýsingar, sum kommunan hevur biðið um, sigur Katrin Petersen, tá hon verður spurd, hví tað ikki ber til at fáa upplýsingarnir, sum innlit er biðið um.

*So Tórshavnar kommuna hevur ikki áhuga í allari kanningini, sum hon hevur nýtt umleið 200.000 krónur av skattaborgarans peningi til?*

– Sjálvandi hava vit tað, sigur Katrin Petersen.

Tá Sosialurin spyr, hvussu hetta hongur saman, er svarið, at kommunan hevði áhuga at vita, hvussu stovnarnir sum heild klára seg, og at tað gav eitt gott úrslit.

### Betri enn Århus

Í almennu úrslitunum av kanningini, sum Lóður hevur gjørt fyri Tórshavnar kommunu, verður samanborið við kanning, sum greiningarfyritøkan Rambøll hevur gjørt fyri Århus kommunu.

Úrslitið, sum er borið fram í kanningini hjá Lóðri fyri Tórshavnar kommunu, vísir, at stovnarnir í Tórshavnar kommunu í miðal eru eitt vet betri umtóktir enn teir í Århus.

Men í almennu úrslitunum hjá Århus kommunu ber eisini einfalt til at finna fram til, hvussu nøgdsemið er við einstaku stovnarnar. Hetta úrslit verður millum annað nýtt av foreldrum, tá tey skulu velja dagstovn til síni børn.

Nú vil Tórshavnar kommuna ikki samanbera meira.

– Tað er so Århus, sum hevur valt at gera soleiðis, sigur deildarleiðarin á barna- og ungdómsdeildini.




*Sosialurin hevur biðið um innlit hjá Tórshavnar kommunu at fáa at vita, hvørji nøvn eiga at setast á prikkarnar við spurnartekni. Men millum tær yvir 80 síðurnar, sum Tórshavnar kommuna latið Sosialinum um kanningina finst hesin samanhangur ikki*